FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 14. november 2025
J. nr.: 25/29377

**Svar uppá fyrispurning nr. 52-041/2025 frá Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttir, løgtingskvinnu, settur Ruth Vang, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum, Spurningur um rúsevni**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógvir frítíðar-/stuttleikabátar hava tilsamans verið í føroyskari havn higartil í ár?
2. Hvussu nógvum av hesum bátunum hava tollarar verið umborð á higartil í ár og kannað við komu, undir hesum eisini fyri ólóglig rúsevnir?
3. Hvussu nógvir av bátunum eru komnir í ávikavist Tórshavnar havn, Klaksvíkar havn og Vágs havn,og hvussu nógvir teirra eru blivnir kannaðir við komu?
4. Hevur nakar av bátunum verið í føroyskari havn meir enn einaferð í ár, og um so er, í hvørji havn og hvussu ofta?
5. Hvussu nógvir tollarar eru staðsettir í ávikavist Havn, Klaksvík og Suðuroynni?
6. Hvussu nógvir narkohundar eru í Føroyum, og er hetta tal nøktandi?
7. Hvar í Føroyum eru narkohundarnir staðsettir, og hvar hava teir verið brúktir higartil í ár?

**Svar til spurning nr. 1:**
TAKS hevur higartil í ár skrásett 183 frítíðar-/stuttleikabátar, sum eru komnir í føroyskar havnir.

**Svar til spurning nr. 2:**
Arbeiðshátturin hjá TAKS er, at frítíðar-/stuttleikabátar verða tiknir út til eftirlit grundað á váðametingar. TAKS upplýsir ikki um arbeiðsgongdir í sambandi við eftirlit, undir hesum hvussu nógvir bátar verða kannaðir.

**Svar til spurning nr. 3:**
TAKS hevur skrásett:
- 94 frítíðar-/stuttleikabátar sum eru komnir í Tórshavnar havn
- 10 frítíðar-/stuttleikabátar sum eru komnir í Klaksvíkar havn
- 45 frítíðar-/stuttleikabátar sum eru komnir í Vágs havn

Arbeiðshátturin hjá TAKS er, at frítíðar-/stuttleikabátar verða tiknir út til eftirlit grundað á váðametingar. TAKS upplýsir ikki um arbeiðsgongdir í sambandi við eftirlit, undir hesum hvussu nógvir bátar verða kannaðir.

Tinganes • Box 2039 • FO-110 Tórshavn
☏ (+298) 35 20 20 • fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

**Svar til spurning nr. 4:**
Sambært skrásetingum hjá TAKS sær út til at 15 av skrásettu stuttleikabátunum hava verið í Føroyum meira enn einaferð í ár. Talan er tá serliga um, at bátarnir eisini hava verið í Íslandi og vent. Eingin av hesum hevur verið meira enn tvær ferðir í Føroyum í ár.

Soleiðis hevur býti verið, og hetta skal lesast sum, at t.d. hava 4 ymiskir bátar verið í Tórshavn tvær ferðir.

| | |
|---|---|
| 4 | Tórshavn og Tórshavn |
| 2 | Vágur og Vágur |
| 2 | Fuglafjørður og Tórshavn |
| 1 | Vágur og Vestmanna |
| 1 | Klaksvík og Tórshavn |
| 1 | Klaksvík og Tvøroyri |
| 1 | Klaksvík og Vágur |
| 1 | Fuglafjørður og Vágur |

**Svar til spurning nr. 5:**
TAKS hevur 12 tollarar staðsettar í Havn, og fremja hesir eftirlit runt alt landið. TAKS hevur ikki tollarar fast staðsettar í Klaksvík og Suðuroynni.

**Svar til spurning nr. 6:**
TAKS hevur tveir narkohundar. Viðvíkjandi narkohundum, so eru teir eitt amboð, sum TAKS hevur við í neyðugu raðfestingini í mun til tal av tollarum. Í løtuni metur TAKS at tveir hundar er nøktandi.

**Svar til spurning nr. 7:**
Tollarnir, sum narkohundarnir hoyra til, eru staðsettir í Havn. Narkohundarnir fremja eftirlit runt alt landið, har tørvur er á teimum, grundað á váðametingar. TAKS upplýsir ikki, hvar eftirlit verður framt.

Tinganes, 14. november 2025

**Ruth Vang**
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum